# Nýggjasti móti á Rex

MÓTI

*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

Eitt øðrvísið mótashow - við klæðum til bæði fólk og hundar- var hóskvøldið hildið á Rex. Hálkan hevði allarhelst sína ávirkan á tiltakið, tí fleiri stólar stóðu tómir í salinum. Men tey, ið hættaðu sær oman, fingu eitt gott show

Átta handlar vóru við í sýningini: Sirri, Siri, Touché, Drós, Kallkyn, Thomas Dam Ítróttur, Optikbúðin og Fótbúðin. Hár og sminka var gjørt av Royal hárfríðkan.

Tað var felagið Miðbýurin, sum stóð fyri tiltakinum, og høvuðsfyriskipari var Óluva á Lofti.

Hon sigur, at tað var spildurnýggj jólamótin, sum júst er komin, sum varð vístur fram.

- Eg haldi, at tað hevur verið so nógv fokus á SMS, at fólk gloyma hvussu sjarmerandi tað er at ganga niðri í miðbýnum. Hetta er eitt átak fyri at seta fokus á miðbýin aftur, tí vit hava sera nógv at bjóða á øllum økjum, greiðir Óluva frá.

Hon sigur, at viðskiftafólkini eru vorðin meiri tilvitað um hvat tey vilja hava, og tey krevja tí alsamt meiri. Tí valdi hon at gera eitt so stórt tiltak.

Umframt mótasýningina, var eisini framførðsla við Una Debes, ábit og okkurt leskandi. Harafturat var lutaseðlasøla við góðum vinningum og dansisýning.

-Eg haldi, at tiltakið er sera væleydnað. Og hetta verður heilt víst endurtikið skjótt aftur, sigur Óluva á Lofti at enda.



*Óluva á Loftið var høvuðsfyriskipari av showinum á Rex.*
*– Miðbýurin hevur so ótrúliga nógv at bjóða, og tí hava vit valt at seta fokus á miðbýin við hesum stóra tiltakinum, sigur hon*











# Fult hús til Eivør



*Flestu løgini á konsertini hjá Eivør í gjárkvøldið vóru av nýggjastu fløguni hennara, Mannabarn*

*Mynd: Sunva E. Lassen*

Hóast nógvu hálkuna í gjárkvøldið, vóru nógvir áhoyrarar komnir í Hoydalar at lurta eftir eini sera vælupplagdari Eivør Pállsdóttir, sum hevði konsert í fullsettari aulu á Studentaskúlanum. Við sær á pallinum hevði Eivør góðar tónleikarar og kórgentur. Tey vóru Graham Henderson, klaver, Chris Hertzberger, violin, Edvard Nyholm Debess, kontrabass, Rógvi á Rógvu, trummur, Benjamin Petersen, gittar, Ása Wraae, munnharpu og sang og yngru systrarnar hjá Eivør, Elisabet Maria og Elinborg, ið sungu við á tí eina lagnum, sum er uppkallað eftir teimum báðum.

Úr Føroyum gongur leiðin til Íslands. Sunnudagin klokkan 17 hevur Eivør konsert í Reykjarneshøllini í Reykjavík

Sosialurin hevur ummæli av konsertini hjá Eivør í Hoydølum í næstu viku.

**-karim-**



*Systrarnar hjá Eivør, Elisabet Maria og Elinborg, sungu eisini við á tí eina lagnum. Til vinstru Ása Wrae, ið sang og spældi munnharpu*

*Mynd: Sunva E. Lassen*